## Kuba skal lata fangar leysar

Í hesum døgum eru seks ár, síðani myndugleikarnir í Kuba handtóku 75 politiskar andstøðingar og settu teir í fongsul. Nú krevur USA, at landið skal lata allar politiskar fangar leysar alt fyri eitt. Tað stendur í einari fráboðan, sum amerikanska uttanríkisráðið hevur almannakunngjørt í sambandi við seks ára dagin fyri handtøkunum. Talsmaðurin hjá uttanríkisráðnum, Robert Wood, sigur, at USA vil hava kubansku myndugleikarnar at sleppa øllum politiskum fangum leysum og at bøta um mannarættindini í landinum. Herfyri ljóðaði, at mannarættindini eru versnað í Kuba, síðani Raúl Castro tók við sum forseti eftir bróðurin Fidel Castro.




## Avstralia á veg í kreppu

Westpac, sum er tann størsti bankin í Avstralia, sigur í einari nýggjari greining, at landið er á veg inn í eina búskaparkreppu. Matthew Hassan, sum er hagfrøðingur hjá Westpac, sigur við Reuters, at afturgongdin í avstralska búskapinum teir báðar seinastu mánaðirnar er tann størsta í 49 ár. Hagfrøðingurin sigur, at kreppan hevði ivaleyst verið uppaftur verri, um rentan ikki var lækkað so nógv, og um stjórnin ikki hevði latið 50 milliardir dollarar út í fíggjarkervið. Í seinasta ársfjórðingi í fjør hevði Avstralia negativan búskaparvøkstur, og tað var fyrstu ferð í átta ár, skrivar Reuters.

# Ein býarmynd hvørvur

**Eftir 30 ár í starvi hjá Tórshavnar kommunu hevur Jens Marius Poulsen nú biðið um at verið loystur úr starvi sum býarstjóri. Hann gevst, tá hann fer í summarfrí í summar**

LÍVSSTARV
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Sjálvandi hevur tað verið ein tung avgerð. Tað er altíð trupult at gevast, tá tú hevur verið so leingi í einum starvi, men eg haldi, at hetta hevur verið ein góð avgerð.

Tað sigur Jens Marius Poulsen, býarstjóri í Tórshavnar kommunu.

- Nú verði eg 67 ár í juni mánað, og eg havi verið 30 ár á býráðnum, og tá haldi eg, at mín leiklutur er útspældur her, sigur Jens Marius Poulsen.

Hetta er ein avgerð, sum býarstjórin hevur hugsað um leingi.

- Eg havi tosað við borgarstjóran um hetta longu fyri einum ári síðani og fyrireikað hann upp á, at eg fór at leggja frá mær, so tað hevur hann vitað í eitt ár minst, sigur Jens Marius Poulsen.

Hendan tilgongdin, sum hevur varað eitt ár – og sum hevur umfatað at siga formanssessin í valstýrinum frá sær – hevur verið so long, fyri at nýggj fólk kunnu serast inn í arbeiðið.

- Tað fer sjálvandi at bera til at heita á meg um góð ráð, skuldi verið brúki fyri tí, men tað sær út til, at ungu fólkini hava tikið væl við mannagongdunum longu, sigur Jens Marius Poulsen.

Tað fer sjálvandi at verða ein rættiliga kollvelting frá at hava havt 12 tíma arbeiðsdagar til einki at gera, men býarstjórin hevur fleiri frítíðaráhugar, sum fara at fylla nakað at tómrúminum út.

- Eg havi bát, sum nógvir aðrir havnarmenn, og eg havi eisini verið eitt sindur við Westward Ho. Hevði ta gleði at verða við henni tvær túrar í fjør, og eg hjálpi eisini til við at rigga hana til. Nakað av jørð havi eg eisini og ein urtagarð, so tað man fara at fylla meginpartin av degnum, sigur Jens Marius Poulsen.

### Snarskivan

Býarstjórin sigur, at fólk, sum vilja gera nakað, ongantíð keða seg, og tað roknar hann heldur ikki við, at hann fer at gera.

- Leggur man seg heima á sofuni, so rotnar man, sigur Jens Marius Poulsen.

Sjálvandi eru nógvar broytingar farnar fram í hesi 30 árini, býarstjórin hevur starvast hjá kommununi, men skal hann taka nøkur einstøk øki fram, so vil tað verða KT og Snarskivan.

- Tá eg byrjaði hjá býráðnum, var KT rættilgia nýtt, men eg hevði so verið so heppin, at eg hevði arbeitt við tí framman undan. Eg minnist, at fólk valfartaði inn her at vita, hvussu arbeitt bleiv við tekstviðgerð. Men tað størsta, eg havi gjørt, er Snarskivan. Eg sá beinanvegin, at vit høvdu einar tíggju ymsar avgreiðslur, og man sendi fólk meiri ella minni apríl við at senda tey frá einum staði til tað næsta. Tí varð Snarskivan sett á stovn, og tað haldi eg fólk eru glað fyri, bæði her á býráðnum og borgararnir, sigur Jens Marius Poulsen.

Nú kann býarstjórin so hyggja aftur á eitt langt tíðarskeið í býráðnum og njóta sítt otium.

- Ja, eg má siga, at eg havi verið ógvuliga glaður fyri at hava verið her. Nógv fólk siga, at eg havi verið ein provokatørur, men eg havi ikki verið bangin fyri at bróta upp úr nýggjum. Onkur skal gera tað, og eg eri glaður fyri at síggja, at nógv av tí, eg havi gjørt, ber frukt. Tað er tað, eg kann vera mest glaður um, at hava latið nakað gott eftir mær. Eg vil ynskja øllum tað besta, bæði starvsfólki, politikarum og fólki, sum her býr, sigur Jens Marius Poulsen, býarstjóri.



*Jens Marius Poulsen hevur starvast hjá Tórshavnar kommunu í 30 ár. Tá hann fer í summarfrí í summar, kemur hann ikki aftur til arbeiðis, men verður pensjóneraður – um býráðið altso gongur umsókn hansara á møti í kvøld. Og tað má roknast við*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Joly skal kanna fíggjarsvik

**Íslendska stjórnin hevur fingið norsk-fronska avhoyringardómaran, Evu Joly, at standa á odda fyri kanningum um fíggjarsvik í Íslandi undan skrædlinum í íslendska búskapinum**

FÍGGJARSVIK
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Eftir skrædlið í íslendska búskapinum skyldar hvør einasti íslendingur, frá nýføðingi til olding, nú 2,2 milliónir krónur í statsskuld. Samstundis ganga áhaldandi søgur um, at tað eydnaðist nøkrum persónum at tøma landið fyri reiðan pening beint undan skrædlinum, samstundis sum trygging-arsvikið er umfatandi.

Nú hevur íslendski løgmálaráðharrin, Ragna Árnadóttir, so heitt á altjóða viðurkenda avhoyringardómaran, norsk-fronsku Evu Joly, um at standa á odda fyri kanningunum um fíggjarsvik í Íslandi.

Onkur skal standa til svars fyri skrædlinum, og kanningin er úrslitið at einum fólkakravi um, at greiða illgrunarnar út.

Í íslendskum sjónvarpi segði Eva Joly, at íslendska fólkið stendur í somu støðu sum borgararnir í Angola, eftir at mutursúrgaða stjórnin har var stungin av við landskassanum.

Eva Joly hldur, at tað er nóg mikið at tríva í.

Enn er nakað tíðliga at meta um, hvussu umfatandi trupulleikarnir eru, men bara tað, at áhaldandi illgruni um mutur er millum manna, sum upptekur miðlarnar nógv, er grundarlag fyri gjølligum kanningum, sigur Eva Joly við Berlinske Tidende.

Sum kanningardómari førdi Eva Joly sakir í Fraklandi móti Crédit Lyonnaise og eini røð av øðrum bankum. Og dómarin ætlar sær harðliga til verka.

Tað er ein stór misskiljing at bíða við einari slíkari kanning, til málið er gjørt til eina sak. Tað er neyðugt at fara í gongd orsakað av illgrunanum eina, og alt skal takast við, heilt frá kanningum av roknskapum til húsarannsóknir, sigur Eva Joly.

Við Morgunblaðið sigur Joly, at størri dentur skuldi verið lagdur á hendan háttin av kriminaliteti, og at tær kanningar, sum higartil eru gjørdar, bert eru lótir. Og at hon metir støðuna saman við Angola, sum er eitt hitt mest muturrakta landið í heiminum vísir, hvussu álvarslig støðan er, skrivar danska blaðið Børsen.

*Eva Joly skal nú kanna illgrunarnar um fíggjarsvik í Íslandi*

